# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## U19 tapti

Føroyska U19-landsliðið er í hesum døgum í Lettlandi til EM-undankapping fyri U19-landslið. Føroyar spældi í fyrsta dystinum javnleik móti Kroatia. Føroyar spældi móti Italia leygardagin. Fyrri hálvleikur var sera javnur, men Italia legði seg á odda í 22. minutti. Føroyska U19-landsliðið spældi fult og heilt upp til italska liðið í fyrra hálvleiki og royndi at fáa javna áðrenn hálvleik, men tíverri gekk tað ikki. Í seinna hálvleiki legði Italia størri trýst á, og tað var neyðugt hjá føroyska liðnum at ansa betur eftir, tí fleiri gul kort vóru givin. Italia fekk tvey mál afturat í seinna hálvleiki, í 54. minutti og 61. minutti. Men móti endanum av dystinum komu okkara leikarar væl inn í dystin aftur, og tað var nær við, at føroyingarnir minkaðu um munin. Dysturin endaði 3-0 til Italia. Seinasti dysturin í bólkaspælinum verður móti Lettlandi týsdagin.

**»Føroyska liðið er væl fyrireikað. Hann veit helst meira um okkara lið og okkara spæliskipan, enn um sítt egna lið. Tað fer at hjálpa teimum. Hann vil vinna móti okkum**

STEPHEN CRAIGAN, LANDSLIÐSLEIKARI HJÁ NORÐUR-ÍRLAND, UM BRIAN KERR

**»Saman-umtikið var íslendenski sigurin greið-ur. Í støðum var klassa-munur. Serliga á breiddini vann Ísland fleiri stig**

UM SVIMJILANDSDYSTIN Í ÍSLANDI



*Svangaskarður*

# Gott og væl 200 norður-írar til Føroya

Uni Holm Johannesen

Fótbóltssambandið upplýsti í vikuskiftinum á sínari heimasíðu, at umleið 200 norðurírar fara at stuðla sínum fótbóltslandsliðið á Svangaskarði týsdagin.

Dysturin millum Føroyar og Norður-Írland byrjar klokkan 16.00.

Føroyska landsliðið hevur tvær ferðir áður roynt seg móti Norður-Írlandi í fótbólti. Í Belfast í 1990 var úrslitið 1-1. Tá liðini hittust í Landskrona vunnu norðurírar 5-0.

# *Miðlarnir skriva...*

*»Gleðiligt var í dag at síggja, at Bárður Johannesen aftur var til dystin fús. Serliga í vejruni gjørdi Bárður góðan mun, og tá nakrar venjingar eru farnar afturum, verður hann uttan iva eins vandamikil í álopinum, og hann var farna kappingarár.«*

**• Heimasíðan hjá Kyndli aftaná dystin móti StÍF í gjár**

*»Vit hava kannað málið í manshópinum og kvinnuhópinum hjá Neistanum, og menninir eru klárt á odda. 27,2 prosent av neistamonnum og fimm prosent av neistakvinnum roykja. Seks neistamenn roykja, og ein kvinna roykir eitt sindur. Kundi verið áhugavert at frætt, um hetta er nakað, sum venjarar tosa við sínar spælarar um.«*

**• Heimasíðan hjá Neistanum**

*»Eitt er, at vit ikki hava funnið rætta stevið enn, men at hugburðurin er heldur ússaligur, tað er ov galið. Rætti dystarandin hoyrdist ikki fyrr enn hálvur seinni hálvleikur var spældur, men tá er ov seint. Alt í alt eitt vánaligt avrik av okkum, og vit kunnu tí fegnast um, at hetta kann gerast nógv, NÓGV betur.«*

**• Heimasíðan hjá H71 aftaná dystin móti KÍF**

*»Team Klaksvík fekk enn eitt stórtap á heimavølli. At tapa við níggju málum móti VÍF, er ikki eitt úrslit, sum Team Klaksvík kann vera nøgt við.«*

**• Heimasíðan hjá Team Klaksvík aftaná dystin móti VÍF**

## Klumman:

# Skapið so áhugan sjálvir!

Uni Holm Johannesen

Tað er nevnt aftur og aftur í føroysku fjølmiðlunum. Tað eru ov fáir áskoðarar, sum stuðla fótbóltslandsliðnum.

Tað er eisini rætt, at áhugin fyri landsliðnum er ikki hin sami, síðan Allan Simonsen gavst sum landsliðsvenjari í 2002.

Fleiri gomul og fløvandi minnir frá landsdystum á Svangaskarði eru á heimasíðuni youtube.com. Svangaskarður er á tremur við mælskum og ídnum føroyskum áskoðarum, tá landsliðini hjá Spania, Malta, Skotlandi, Slovenia, Bosnia-Hersegovina og øðrum vitja í Føroyum.



*Julian Johnsson*

Tú visti altíð, hvat Julian Johnsson, Todi Jónsson, Óli Johannesen, Uni Arge, Øssur Hansen, Pól Thorsteinsson, Allan Mørkøre, Kurt Mørkøre og hinir løgdu fyri dagin. Hvítu landsliðstroyggjurnar vóru gravskitnar, sum teir kastaðu seg niður í glíðandi takklinar, skump-aðu mótstøðumenninir og runnu eftir bóltinum. Hvørjaferð. Tað var skomm at hopa undan. Tú kundi grenja aftaná. Eingin helt seg aftur, tí teir høvdu fingið hol á høvdið ella bløddu í knænum. Um tað var neyðugt, so fingu teir bind um høvdið, og so út aftur á vøllin. Teir staðfestu, at ræðuskítar renna undan. Rættir menn herja á. Sama, um støðan var 0-0 ella 0-5.

Stríðsviljin fjaraði í smáum burtur, tá Henrik Larsen, og seinni Jógvan Martin Olsen, settu seg í venjarasessin.

Tað var tí ein fragd, at landsliðsleikararnir spældu aftur við fullari ferð, tá Brian Kerr tók við sum landsliðsvenjari.

Men stríðsviljan hava vit ikki sæð seinastu landsdystirnar.

Tað er ein sannroynd, at føroyingar tíma ikki til landsdyst, bara tí tað er landsdystur. Tað er ikki nóg mikið bara at síggja spælarar úr stórum evropeiskum feløgum í Føroyum longur.

Landsdystir skulu vera 90 minuttir av tjóðskaparligum stoltleika. 90 minuttir við føroyska stoltleikanum, sum vit so fegin vilja knýta at bardaga og søguni um David og Goliat. Og hóast vit ikku rukku dreyminum um stig, so vilja vit framvegis veittra við føroyska merkinum aftaná dystin og siga, at vit gjørdu okkara ítarsta.

Alt ov ofta eru landsliðsleikararnir ikki sinnaðir at stríðast. Seinastu dømini eru móti Italia og Slovenia. Tað er eingin orsøk hjá okkum at fara til landsdyst, um vit ikki fáa ein feril av tjóðskaparkenslu, men heldur eitt stórtap við vánaligum hugburði fyri pengarnar.

At vit ikki eru førir fyri at bjóða hinum av, tað er eitt. Tað vóru Todi Jónsson og hinir heldur ikki.

Men at vit ikki so frægt gera eina heiðurliga roynd at bjóða hinum av, tað er eitt annað.

Tað tími eg so ikki at gjalda fyri.

Tað eru landsliðsspælararnir, sum skulu skapa áhugan fyri landsliðnum.

*uni@sosialurin.fo*